# Eg fór totalt niður

**VITJAN – Lív mítt fór totalt í svart, tá eg fekk boðini um at eg aldrin fekk ta fullu sjónina aftur, sigur vestmenningurin Ovin Klein Olsen. Hann er nú komin fyri seg aftur, og úrslitið hoyrist á fløguni "Tilbage til livet" sum kom út fyrr í ár. Allir teir 14 sangirnir eru tiknir úr egnum barmi**



*Ovin Klein Olsen soleiðis sum vit kenna hann – við guittarinum – her á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna fyrr í ár. – Tónleikurin bjargaði lívi mínum, sigur tann nærum blindi tónleikarin og guittarlærarin*

## Vitjar aftur í Føroyum

Í hesum døgum vitjar Ovin Klein Olsen aftur í Føroyum. Hann vitjaði her fyrr í ár, men fer aftur nú at hava framførslur á ymiskum støðum.
Skráin hjá honum er henda:

Mánadagur 2. august:
Meinigheitshúsið í Tórshavn KL. 19
Hósdagur 5. august:
Hotel Hafnia í Tórshavn (privat avtala)
Leygardagur 7. august:
Missiónshúsið í Skopun KL. 19
Sunnudagur 8. august:
Missiónshúsið á Sandi KL. 18
Mikudagur 11. august:
Leirvíkar Missiónshús KL. 19.30
Leygardagur 14. august:
Meinigheitshúsið í Vági KL. 19
Sunnudagur 15. august:
Missiónshúsið á Tvøroyri KL. 18

Snorri Brend

## Sangirnir eru skrivaðir við einum einasta endamáli: At fáa onnur at hugsa eitt sindur meiri um lívið og ikki koyra avstað við 150 km/t

Hetta var ein vanligur dagur í mai mánaði 2006.

Árstíðin bjóðaði til sól, hita og ljós, men soleiðis var ikki hjá Ovin, sum hevur búð í Danmark í mong ár.

– Eg vaknaði henda morgunin, tendraði sjónvarpið fyri at vita hvat nýtt stóð á tekstvarpinum. Men eg legði tá merki til, at eg sá næstan einki.

– Nei, hjá mær var alt grátt í grátt, greiðir hann frá.

Støðan hjá honum gjørdist ikki betri av, at læknarnir søgdu honum at sjónin fór ikki at gerast betri við tíðini. Heldur hinvegin:

Ovin fekk nevniliga at vita, at hann mátti fyrireika seg uppá eitt lív sum sjónveikur, har sjónin ein dag kundi hvørva heilt.

– Ja, hetta kom sum eitt sjokk fyri meg. Eg fór totalt niður í kolkjallaran.

### Trupul morgunstund

Ovin Klein Olsen hevði nóg mikið at takast við hesa tíðina, sum leiðari av eini matstovu.

– Her gekk eg og trúði, at lívið sum sum krógv-eigari skuldi vara við, heilt til eg ikki orkaði at tyggja smør meiri. Men eg fekk annað at síggja, leggur hann dent á.

Eftir einari lítlari morgunstund varð lív hansara broytt fullkomuliga. Frá at hava verið sera virkin í fyritøkuni, til eitt heilt annað lív, har hann varð 100 prosent bundin av hjálp frá øðrum.

– Ja, eg kom so langt út, at eg setti spurnartekin við um hetta lívið mundi vera vert at liva.

Tíbetur broytti hann hugsan. Og við hjálp av næstringum sínum fann hann lívið aftur, sum hann tekur til.

– Eg havi altíð elskað tónleik. Og hann varð bjargingin hjá mær, tí eg byrjaði faktiskt